– trygt og ómakaleyst til hús



# Stór, góð og livilig hús á Argjum

**Úti við tromina á Hamaranum á Argjum standa hesi stóru, rúmligu, liviligu og snotiligu húsini við einastandandi útsýninum yvir alla Havnina og fjørðin.**









## Fyrsta fatanin

Tú ert í bygdum øki, men náttúran liggur vøkur og friðarlig beint uttan fyri dyrnar, so tú alt fyri eitt kemur í eitt lint huglag, ið er gott fyri likam og sál. Útistovan gevur tær eitt frálíkt samband við nær- og fjarumhvørvið. Útsýnið úr stovuni yvir Havnina, fjørðin og fjøllini norðanfyri er heilt einastandandi. Tað verður neyvan betri nakrastaðni. Tú koyrir inn í snøgga túnið við dupultum bilskúri (carporti) og kanst ganga turrskøddur inn í húsini. Húsini eru vinalig, opin og innbjóðandi at koma til, men giringin ger, at tú ert fullkomuliga í friði inni hjá tær sjálvum.

## Ljós og luft – inni og úti

Stóru vindeyguni geva nógv ljós inn í rúmini, og hurðin beint úr alrúminum og út í havastovuna geva eitt heilt serstakt samband millum úti og inni. Tú kennir teg á ongan hátt innilokaðan, og samstundis kanst tú væl og virðiliga vera ósæddur og í friði inni hjá tær sjálvum. Opna bilhúsið er eisini eitt flótandi skifti millum virksemi úti og inni, meðan tú í vásarúminum aftanfyri kanst vera tín egni.

## Stílur og snið

Húsini sýnast minni, enn tey eru, og eru sera rúmsátt innan, tí plássið er gagnnýtt og innrættað sera væl. Alt er gjørt úr besta tilfari og við besta handverki. Stílurin er sum heild ljósur og opin. Stovan er opin upp í tróðrið, og hartil eg mekaniskluftskiftisskipan, so innan er alt frískligt og lætt. Húsini eru dagførd og viðlíkahildin, so tey eru so góð sum nýggj. Tey eru sera væl innrættað til stóru familjuna og eru egnað til bústað ein og til vinnuligt virksemi av einumhvørjum slagi. Veggir kunnu flytast, so rúmuppbýtið kann broytast til t.d. íbúð/ir. Tú kanst ganga inn niðriundir og í erva, og mong fólk kunnu búgva uttan at órógva hvønn annan alt ov mikið. Betondekk er millum hæddirnar, so lítið og einki hoyrist ímillum. Øll kunnu finna sær virksemi og frið eftir tørvi.

## Uttanfyri og uttanum

Sera snøggur garður er uttanum. Alt er gjørt heilt liðugt við betonkantum og giring, asfalti og flísum, og dentur er lagdur á, at alt skal vera so viðlíkahaldsfrítt sum gjørligt. Húsini standa í góðum grannalagi í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi við blindan veg. Dagstovnar, nýggi skúlin og busssamband er nær við.

## Innrætting

Húsini eru í 2 hæddum við bilskúri og havastovu. Hvør hæddin er uml. 136 $m^2$ – í alt uml. 272 $m^2$. Í ovaru hædd er inngongd, durur, hjallur, grovkøkur / brygges, køkur / alrúm við útgongd til havastovu, borðsstova / stova, trappugongd, kamar, wc og hjúnarúm við atgongd til egið baðirúm. Í niðaru hædd er bilskúrur, snøgt vásarúm / fýrrúm, ítrivsrúm / millumgongd, inngongd, durur, gongd / trappugongd, 6 kømur og skrivstova.

## Fakta

**Adressa** .............Viðargøta 2, Argir
**Byggiár:** .............1999
**Hæddir:**...............2
**Gólvvídd:**............272 $m^2$
**Grundøki:**............617 $m^2$
**Hjallur:** ................Ja
**Bilhús:** .................Ja
**Prísuppskot:** ......kr. 2.900.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**